ÍTRÓTTARÁRIÐ

Desember:

Landsliðsvenjarin settur

Jónleif Sólsker tekur endaliga avgerð um, at hann skal venja føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti. Seinni í mánaðinum tekur hann fyrsta bruttohópin út

Altjóða uppgávurnar verða ikki fyrr enn í 2003, men longu nú er landsliðsvenjarin farin í holt við arbeiðið við kvinnulandsliðnum, og ætlandi verða onkrar avbjóðingar á skránni komandi árið

1. desember
Hjalgrím Elttør hevur gjørt av, at hann eisini komandi árið fer at spæla við KÍ.
FCK leggur fram ársroknskapin. 22 milliónir er yvirskotið.

4. desember
Jónleif Sólsker hevur endaliga játtað, at hann tekur við sum venjari hjá kvinnulandsliðnum í hondbólti.
Fram er aftur á odda í flogbóltskappingini, men ÍF á øðrum plássi hevur ein dyst færri,
Hjá kvinnunum fær TB aftur gongd á, tá tær vinna á ÍF, men nú tykjast klaksvíksvinnur veruliga at hava funnið stevið.
Í kvinnuhondbólti vinnur Stjørnan, soleiðis at bert tvey stig eru upp til VÍF, áðrenn oddaliði kemur á vitjan. Hjá monnunum vinnur VÍF trygt á Kyndli.
Havnar Talvfelag vinnur stórt á Vestmanna, og er nú á øðrum plássinum í kappingini. Hálvt stig aftan fyri Klaksvíkina.
EM-undanakappingin fyri U-21 lið í manshondbólti verður í Føroyum. Umframt Føroyar eru Russland, Cypern og Jugoslavia í bólkinum. Dystirnir verða helst leiktir mei mánaði.

5. desember
Flogbóltssambandið ger av, at dysturin millum Fleyr og ÍF skal spælast umaftur, eftir at Fleyr hevur kært eina dómaraavgerð.
Jens Erik Rasmussen, sum hevur leikt við Leiftri, fer komandi árið at virka sum leikandi hjálparvenjari hjá FS Vágum.
Bill Justinussen fer komandi árið at verða hjálparvenjari hjá Jógvani Martin Olsen í NSÍ.

6. desember
FCK tapir aftur í útidystinum móti Borussia Dortmund, og aftur hesa ferð er úrslitið 1-0.

7. desember
Súni Merkistein gevur út bók um HM-undankappingina í fótbólti 2000/2001.
Bæði í hond- og flogbólti er spenningurin stórur undan vikuskiftinum. Í Klaksvík spæla Stjørnan og VÍF oddadyst í kvinnuhondbólti, meðan Fram og SÍ spæla toppdyst í mansflogbólti.

11. desember
Hanna Dalsgaard av Argjum gerst Miss Galaxy Føroyar, tá hon er einasti av føroysku luttakarunum, sum megnar at fullføra allar greinarnar, tá altjóða kapping er í Høllini á Hálsi.
Fleyr leggur seg á odda í flogbóltskappingini, tá teir vinna oddadystin í Sørvági. Hjá kvinnunum er Mjølnir um at tapa á Kambsdali, men tær fáa tó vent dystinum móti ÍF til egnan fyrimun.
VÍF-kvinnurnar vinna útidystin á Stjørnuni, og strykja harvið um oddastøðuna. Samstundis tapir VB heldur óvæntað í Havn fyri Kyndli.
Hjá monnunum vinna bæði Neistin og VÍF aftur hetta vikuskiftið.

12. desember
Janus M. Joensen, Palli Augustinussen, Tór-Ingar Akselsen og Pól Næs Joensen eru allir nýggir í landsliðshópinum, sum Jógvan Martin Olsen tekur út til venjingarleguna í Cypern komandi vár. Enn er tó ikki avgjørt, hvør verður nýggjur landsliðsvenjari.
FSF hevur ásett leikdagarnar fyri komandi kappingarár. Landskappingin byrjar ætlandi fyrsta vikuskiftið í mei.

13. desember
Stjørnan hevur óvæntaðar trupulleikar, men vinnur kortini eftir longda leiktíð í 1/4-finaluni í steypakappingini á StÍF.

14. desember
Neistamenninir tryggja sær atgongd til hálvfinaluna, tá teir basa grannunum úr Kyndli. Serligt við dystinum er annars, at dómarapar úr Kyndli dømir, og hetta birtur undir kjakið um, at ov fáir hondbóltsdómarar eru.
Eisini H71 tryggjar sín hálvfinalusess, tá teir vinna tepurt á næst bestu neistamonnunum.
Hjá kvinnunum ger VÍF bart, tá tær vinna sína 1/4-finalu ímóti Tjaldri.
Fótbóltsárbókin kemur út 10. árið á rað.
B86 verður komandi árið styrkt í álopspartinum. Danskur áleypari skal avloysa Súna Fríða Johannesen.

15. desember
Seinastu dystirnir í grundspælinum í flogbóltskappingini skulu leikast um vikuskiftið.
Í hondbóltinum verður bíðað við spenningi, nú VÍF og Neistin tørna saman í Vestmanna.

18. desember
Í meistaradeildini hjá monnum er púrasta javnt, nú farið verður undir endaspælið, eftir at Fleyr vinnur grannauppgerðina ímóti SÍ. Hjá kvinnunum halda TB og Mjølnir fast um kósina móti tindunum.
Oddadysturin í manshondbólti verður avlýstur, men í kvinnudeildini ger VÍF bart móti Neistanum, og tá Stjørnan samstundis tapir í Vági, tykist kvinnukappingin longu avgjørd, hóast grundspælið enn ikki er liðugt.
Uni Arge legst afturat teimum 24 leikarunum, sum upprunaliga vórðu úttiknir til venjingarleguna hjá landsliðnum.

19. desember
Stjørnukvinnurnar megna kanska ikki at taka VÍF aftur, men tær hava so gjørt nakað, sum eingin annar hevur. Nú ber til at keypa ein myndakalendara, sum verður prýddur av klaksvíkskvinnunum.
HSF ger av, at útsetti oddadysturin millum VÍF og Neistan skal spælast 9. januar.

20. desember
Bridge Sambandið hevur gjørt avtalu við Svend Novrup um, at hesin skal gerast landsliðsvenjari hjá Føroyum.
NSÍ setur 32 ára gamla Áka Andreasen í starv sum samskiparа hjá felagnum.
Jónleif Sólsker hevur tikið fyrsta bruttohópin út til kvinnulandsliðið í hondbólti.

21. desember
Heldur óvæntað missa menninir úr Vestmanna stig móti H71, soleiðis at støðan gerst enn spentari í hondbóltsoddinum.
Heðin á Lakjuni hevur enn ikki gjørt av, hvar fótbóltsframtíðin liggur. Her heima liggja bæði KÍ og B36 framvið.

22. desember
Ísak Mikladal, aðalskrivari í FSF, gevur ilt av sær, nú formaðurin í grunninum fyri Tórsvøll tosar um stórar útbyggingar til bæði gistingarhús og matstovur við leikvøllin.

28. desember
Neistin vinnur stórsigur á KÍF, og úrslitið inniber, at nú er púrasta javnt í oddinum. Eisini málmunurin er hin sami sum hjá vestmenningum.
Mjølnir hjá Fleyr tapa púra óvæntað fyri ÍF, og SÍ er aftur á odda, eftir at teir finna heimadystin á SÍ.
TB hevur fingið tilgongd av Gudrid Nolsøe, men avrikið er lítið sannførandi, tá tær vinna 3-1 á Drátti.
Hondbóltskvinnurnar hjá megna ikki at gera nakað við Neistan, sum vinnur dystin um triðja plássið í grundspælinum.

BROT ÚR 2001

Tað søgdu tey

SITAT
Eyðun Klakstein

Gjøgnum árið verða nóg orð søgd í fjølmiðlunum. Sumt er bundið av eini serligari støðu ella árstíð, meðan annað er meira at meta saman við ævigar sannleikar.
Sumt verður sagt spontant í eini serligari løtu, meðan annar er væl umhugsað og vurderað, áðrenn tað verið latið blaðfólki upp í hendi.
Á hesi síðu hava vit savnað okkurt av tí, sum var sagt umvegis Sosialin í árinum sum fór.

Hans Jacob Joensen, bispur

- Hetta tók fast
Signar á Brúnni, fyrrverandi landsstýrismaður, 3. januar, um at nýggjur landsstýrismaður var settur í hansara stað, áðrenn kanningin av hansara embætisførslu reinsaði hann.

- Tað verður ikki serliga samfelagsgagnligt at fáa eina vinnu afturat, sum leggur hald á nógv fólk.
Herman Oskarsson, formaður í Búskaparráðnum, 16. januar, um oljuvinnuna.

- Eg má siga sum er, at eg hevði aldrin verið til eina rockkonsert áður, fyrr enn eg var til Prix finaluna.
Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum, 20. januar

- Stuðulin til og harvið møguleikin fyri at reka privat útvarp í Føroyum kom ikki haðani, eg hevði roknað við. Hevði fyrigyklað mær, at størstu privatu fyritøkurnar í landinum fóru at tryggja raksturin saman við kommunum. Óvissan fór at skipaða mentanarlívið fór at tryggja innihaldið. Men so varð ikki. Als ikki.

Óla Jákup Rólantsson, táverandi programmleiðari á Rás 2, 3. februar, um at reka privata útvarpsrás í Føroyum.

—Vit royna alla tíðina at bøta um trygdina.
Reidar Nónfjall, stjóri á Strandferðsluni, 22. februar, tá Strandferðslan hevði keypt sær tól at gera rúsdrekkaroyndir av sínum starvsfólkum.

- Mítt ynski skal vera, at menn verða meira sjónligir í javnstøðuarbeiðinum. Og samstundis má eg spyrja, hvar allar tær ungu kvinnurnar eru, ið fingu javnstøðu í vøggugávu. Hvar eru tær?
Augusta Mikkelsen, skrivari í Javnstøðunevndini, 10. mars

— Tað hevði verið rímiligt at yvirtikið fólkakirkjuna í 2006, men tað er drastiskt lop at flyta hetta til 2002. Fram til 2006 kundu vit umrátt okkum og fyrireikað yvirtøkuna. Men við nýggju ætlanini er ikki tíð til nakað sum helst.
Hans Jacob Joensen, bispur, 17. mars, um framskundaðu yvirtøkuna av fólkakirkjuni.

— Næstan annaðhvørt fólk í Havn, sum er í vinnu, hevur alment starv.
Økismenningarbólkur í áliti, 11. apríl.

- Í Føroyum verða djór betur vard enn børn.
Sólrun Jacobæus, fráfarandi stjóri á Barnaheiminum, 21. apríl.

— Vit læra í skúlanum, at Føroyar eru so ómetaliga demokratiskar, men so er ikki, tí vit eru heldur á markinum til eina bananrepublikk.
Óli Jacobsen, formaður í Føroya Fiskimannafelag, 1. mai.

— Tey menningartarnaðu hava einki merkt til, at tíðirnar eru vorðnar betri í tí føroyska samfelagnum, og meðan politikarar tosa um metyvirskot, er einki eftir til tey veikastu
Diana í Puntabyrgi, formaðurin í Javna, 16. mai

- Eg eri harmur um at fara, men her eru ongi tár.
Tórbjørn Jacobsen, fyrrverandi landsstýrismaður, 1. juni, tá hann legði frá sær sum landsstýrismaður við mentamálum

— Tá eg ivist í onkrum einstakum orði, plagdi eg spyrja meg fyri hjá Eivindi Weihe. Tí hann sigur mær, hvussu fólk siga, meðan aðir málfrøðingar í Føroyum hava lyndi til at siga, hvussu tey kundu hugsað sær, at fólk søgdu.
Michael Barnes, enskur professari, sum lærir bretar at tosa føroyskt, 7. juli

Michael Barnes, bretskur professari

- Eg haldi, at tað áttu at vera fleiri kvinnur í tinginum, tí hetta er ikki meira enn rættvíst, men tær, sum eru, eru ikki allar ov góðar.
Eivind Jacobsen, sambandsmaður á Strondum, 21. juli

—Eg havi ikki nortið eitt køkustykki seinasta trífjórðingsárið. Sukur eti eg als ikki meira, og alt sjónigt feitt skeri eg burtur.
Anfinn Kallsberg, løgmaður, sum hevur mist meira enn 15 kilo, 28. juli

-Høvuðsidelogiin er, at vit hava eitt land, sum eitur Føroyar, og her er ætlanin, at fólk skulu búleikast á øllum oyggjunum.
Olga Biskopstø, forkvinna í útoyggjanevndini, 4. august

Helga Hjørvar, stjóri í Norðurlandahúsinum

— Tørvurin eftir stuðulsfólki er komin áðrenn skipanin, og tað hevur havt við sær, at økið er ein hurlivasi.
Sámal Petur í Grund, landsstýrismaður, 17. august

— Myndatólið hevur altíð verið mín besti blýantur.
Zacharias Hammer, sjónvarpsmaður, 19. september, tá hann varð heiðraður fyri serligt mentanaravrik.

Allan Simonsen, tá tárini trillaður á tíðindafundi

— Vit rýmdu av skúlanum um náttina av ótta fyri álopi. Teir muslimsku prestarnir hava øst fólkið upp móti teimum kristnu og hvítum, og tí var tað vandamikið hjá okkum at vera verandi.
Høgni Johannesen, trúðboðari, sum rýmdi undan ófriði í Pakistan, 25. september

- Tað er ikki lætt at vera formaður. Beinanvegin tá okkurt gongur galið, so er tað tú sum hevur skyldina.
Karl Johansen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, 13. .oktober

- Eg vil eisini gjarna siga tykkum, at eg altíð havi verið stoltur av umboða land tykkara, og at eg alla tíðina havi kent meg sum ein av tykkara.
Allan Simonsen, fyrrverandi landsliðsvenjari, tá hann gavst sum føroyskur landsliðsvenjari. Og tárini trilladu.

- Tað undrar meg, at so nógvar plágur eru kvennkynsorð; orkan, tora, lús, sjúka, øvundsjúka, yvirvekt og so plágan sjálv.
Urd Johannesen, 27. oktober

- At skriva og framleiða eitt hitt er helst størsta avbjóðingin hjá einum tónasmiði og framleiðara. Tað er lætt at skriva eitt lag, trupult at skriva eitt gott lag og øgiliga trupult at skriva eitt hitt.
Kári Jacobsen, sangskrivari, 24. november.

- Eysturoyingar og serliga mítt nærumhvørvi harta meg fyri tað, sum er hent í mínum privata lívi.
Sámal Petur í Grund, politikari, um vánligt fólkatingsval.

- Emma bukar Britney
Sosialurin, 8. desember, um M'as Blues Band, sum setir heimsstjørnur upp á pláss á føroyska marknaðinum.

— Tú kann gott siga, at vit við hesum hava ótálmaða atgongd til pengar. Tað er ein øgilig rúgva.
Tórbjørn Jacobsen, fólkatingsmaður, um at fáa nógvar pengar til politiskt arbeiði í fólkatinginum.

M'as Blues Band (Emma)